NORÐOYA SPARIKASSI

# Rentubroyting

*Eftir at Danmarks Nationalbank tann 6. mars 2009 hevur lækkað leiðandi renturnar, hevur sparikassin avgjørt at tillaga rentuna við gildi frá mikudegnum 1. apríl 2009. Innlánsrentan lækkar við upp til 0,75% fyri flest allar innlánskontur. Tó lækkar rentan á vanligari bók, fíggjarkontu, 1'aranum og ekann við fastari rentu ikki. Við støði í framhaldandi fíggjarligum órógvi á altjóða marknaðinum, verður útlánsrentan ikki broytt hesuferð. Av somu orsøk hækkar sparikassin marginalin við 0,75% á lánum, kredittum og innlánum, ið vísa til pengamarknaðarrentuna.*

## Innlán

| | |
|---|---|
| Vanlig konta | 0,10% |
| Fíggjarkonta | 0,10% |
| 3 mánaðar uppsøgn | 2,00% |
| 3 mánaðar uppsøgn *(upphædd størri enn 1 millión)* | 3,00% |
| 12 mánaðar uppsøgn | 2,25% |
| 12 mánaðar uppsøgn *(upphædd størri enn 1 millión)* | 3,25% |
| Silvakonta | 2,50% |
| Silvakonta *(uppsparing 100 kr. um mánaðin ella meir)* | 3,50% |
| Gull 1 | 1,25% |
| Gull 2 | 2,50% |
| Gull 2 *(uppsparing 100 kr. um mánaðin ella meir)* | 3,50% |
| Bústaðarkonta *(2,25% + stuðul frá landsstýrinum 3%)* | 5,25% |
| Ábyrgdarpeningur | 3,75% |
| Kapitalpensjón | 3,25% |
| 1'arin | 5,50% |
| e-kann (6-36 mánaðar uppsøgn) | frá 4,00% - 6,00% |
| e-kann (36 mánaðar uppsøgn) | 6,50% |

## Útlán

| | |
|---|---|
| HeimLán | frá 6,00% |
| Billán, 40% útgjald | 7,50% |
| Billán, 25% útgjald | 8,50% |

Við gildi frá 1. juli 2009 hækka hesi ómaksgjøld:

| | |
|---|---|
| Kontuavrit við posti | 10,00 kr. |
| Játtan av yvirdrátti *(upphædd < 10.000 kr.)* | 100,00 kr. |
| Játtan av yvirdrátti *(upphædd > 10.000 kr.)* | 250,00 kr. |
| Sparikassabók | 25,00 kr. |
| Áminningargjald | 100,00 kr. |

*Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík*
*Tel. 475000 Fax 476000 ns@ns.fo www.ns.fo*

# Umhvørvisvirðislønin 2009

Fyri fyrstu ferð fer Tórshavnar kommuna í ár at lata eina serliga umhvørvisvirðisløn. Hetta verður gjørt í Umhvørvisvikuni, sum er frá 4. til 10. mai 2009, og virðislønin verður latin onkrum, ið hevur gjørt nakað serligt fyri umhvørvið.

Umhvørvisvirðislønin, sum er áljóðandi 10.000 krónur, kann latast einum stovni, virki, felagi, bólki ella einstaklingi í Tórshavnar kommunu.

Veitst tú um onkran, sum við einum ella fleiri átøkum hevur gjørt eitt gott arbeiði fyri umhvørvið, kanst tú venda tær til kommununa við tínari innstilling. Eisini ber til at innstilla seg sjálvan.

Send tína innstilling til Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 17. apríl 2009, har tú fortelur eitt sindur um, hvønn tú innstillar, hví viðkomandi skal innstillast og hvønn kommunan kann venda sær til fyri at frætta nærri.

Oyðublað til innstillingina kann takast niður á www.torshavn.fo ella fáast í Snarskivuni, telefon 302010. Innstillingar skulu sendast til:

**Tórshavnar kommuna**
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32 · 110 Tórshavn
torshavn@torshavn.fo



Tórshavnar kommuna

# Selja bilin?
– set hann í Sosialin!




Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo

# Skrivstovustarv á Føroya Skúlabókagrunni

Skrivstovustarv á Føroya Skúlabókagrunni verður lýst leyst til setanar, so skjótt sum til ber.

**Høvuðsarbeiðs-uppgávur** Starvið, sum talan er um, fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði sum t.d. dagliga bókhaldið, telefonavgreiðslu, postavgreiðslu, journal, arkiv v.m. Føroya Skúlabókagrunnur nýtir Búskapar- og Lønarskipan landsins.

**Førleikakrøv** Kravt verður, at umsøkjarin hevur útbúgving innan skrivstovuyrki og er kønur í føroyskum.

**Royndir** Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur arbeiðsroyndir innan almenna fyrisiting.

**Løn og setanar-treytir** Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Royndartíðin er eitt ár.

**Umsóknir** Umsóknir – saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli – skulu vera Føroya Skúlabókagrunni í hendi í seinasta lagi 14. apríl 2009.

**Føroya Skúlabókagrunnur**
**Lützenstrøð 4 • FO-100 Tórshavn**

Um tygum ynskja fleiri upplýsingar, eru tygum vælkomin at ringja til Føroya Skúlabókagrunn, tlf. 316100 og tosið við Niels Petersen, stjóra.

**Stutt um Skúlabókagrunnin**

Føroya Skúlabókagrunnur er eitt alment forlag, sum skipar fyri at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til tað føroyska skúlaverkið. Undirvísingarmiðlar, ið eru í samsvari við tað regluverk og tær lesiætlanir, ið eru galdandi fyri undirvísingarverkið. Í 2009 starvast 12 fólk á forlagnum.

Skúlabókagrunnurin hevur ábyrgd av undirvísingarportalinum Snar. Ritstjórarnir eru við í arbeiðinum at menna henda portal og at útvega eitt hóskandi úrval av talgildum miðlum.

Starvsfólkini arbeiða saman í toymum, og er skrivstovufólkið partur av fyrisitingartoyminum. Nærri kunning um Skúlabókagrunnin er at finna á heimasíðuni: www.fsg.fo.



**Hesin fitti Opel Kadett B**
**er til til sølu. Er fyrstu ferð skrásettur í august 1973 og er í sera góðum standi. Hevur einans koyrt 54.000 km. Hevur havt tveir eigarar, tann fyrra fyrstu 28 árini. Til sølu fyri 22.000 kr**

**Ringið 216409**



# Lesið Sosialin so eru tit við

MÁLARAMEISTARI
Niels Sørensen SP/F
TLF. 31 28 46 & 21 88 46
nielss@post.olivant.fo